## Christian Høgni staðfesti AB-sigur

Føroyski landsliðsspælarin, Christian Høgni Jacobsen endurfann máltevið í Gladsaxe í gjár. AB vann heimadystin ímóti Roskilde 2-0. Støðan í hálvleikinum var 0-0, men í 2. hálvleiki bragdaði hjá akademikarunum, og 2. hálvleikur var ikki meir enn byrjaður, so hevði Poul Hubertz lagt AB á odda 1-0. Tá 8 minuttir restaðu av dystinum staðfesti Christian Høgni Jacobsen sigurin hjá AB til endaliga úrslitið, 2-0 til AB. Tað eru nøkur umfør síðani, at Christian Høgni skoraði fyri AB, men hann valdi sær løtuna væl, nú tá Eysturríki kemur á vitjan í HM-undankappingini. AB er nr. 2 í Viasatdeildini við 19 stigum, og liggur soleiðis til uppflyting. Viborg er fremst við 22 stigum. Thisted hevur 18 stig.



## Reytt hjá Laudrup

Eins og tað var galdandi fyrstu dystirnar í Getafe, so hava reyðu kortini hug at fylgja Michael Laudrup, sum nú er venjari hjá Spartak Moskva. Um vikuskiftið tapti Spartak 1-0 móti Krylya, og Spartak endaði dystin við 9 monnum móti 11. – Eg hevði ávarað spælararnar í steðginum, men teir lurtaðu eftir øllum at døma ikki nóg væl, sigur Michael Laudrup við danska Ekstra-Bladet.

# Torres heldur Liverpool í oddinum

**Við tveimum málum fekk Torres Liverpool við aftur í dystin, og við einum uppleggi syrgdi hann fyri, at Liverpool vann á Manchester City og harvið eigur fremsta sessin í Premier League saman við Chelsea. Í hølunum á mætu stórfeløgunum eru uppflytararnir Hull**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Eftir málini frá Torres um vikuskiftið hevur venjarin hjá Liverpool, Rafael Benitez, sagt, at tað eru nógvir góðir spælarar runt í heiminum, men eingin er betri enn Torres*

*Mynd: Polfoto*

Tá Fernando Torres stutt inn í seinna hálvleik í dystinum ímóti Manchester City minkaði um munin, var tað í mangar mátar eitt umráðandi mál. Hann skapti eina vón um, at dysturin var alt annað av avgjørdur – og Fernando Torres skuldi vísa seg at fáa rætt.

Men málið var eisini umráðandi og merkisvert í aðrar mátar. Tað var nevniliga mál nummar 1000 hjá Liverpool í Premier League. Harumframt syrgdi Fernando Torres við málinum fyri, at hann saman við kekkiska Patrik Berger gjørdist tann útlendski leikarin, ið hevði skotið flest mál fyri Liverpool í Premier League.

Stívliga eitt korter seinni gjørdi Torres enn eitt merkisvert mál, tá hann við høvdinum javnaði til 2-2 fyri Liverpool. Einki serstakt var við sjálvum málinum, men við tí fór hann framum Patrik Berger, og skrivaði seg harvið inn í søgubøkurnar í Liverpool sum teirra mestskorandi útlendingur í Premier League – 29 mál.

Í yvirtíðini var Torres aftur framvið. Tá átti hann uppleggi til málið, sum Dirk Kuyt setti í netið. Harvið hevði spanski áleyparin hjá Liverpool ein fót við í øllum trimum málunum hjá Liverpool.

Ein staðfesting av hansara týdningi fyri Liverpool, og ein staðfesting av, at hann er ein leikari í heimsflokki.

### Heldur áfram frá í fjør

Ævintýrið um »El Niño«, ið Fernando Torres verður róptur og sum merkir barn og sipar til, at hann bæði sær ógvuliga ungur út, og at hann ikki var meiri enn 16 ára gamal, tá hann spældi sín fyrsta dyst fyri Atletico Madrid.

Trý ár seinni, sum 19 ára gamal, gjørdist hann liðformaðurin fyri Atletico Madrid. Hetta var í 2003 og sama ár spældi hann eisini sín fyrsta landsdyst. Á summri í 2007 skifti Fernando Torres til Liverpool. Tá hevði hann skotið 82 mál í 214 dystum fyri Atletico Madrid.

Fyrsta kappingarár hansara í Liverpool var ein stór succés. Hann gjørdi 24 mál í Premier League og var somuleiðis Liverpool ein góður maður í Champions League. Higartil í ár hevur hann gjørt fimm mál í Premier League, og tað hava bara Jermain Deffoe og Amr Zaki eisini megnað. Við øðrum orðum heldur fram við góðu gongdini frá í fjør.

### Chelsea og United vunnu trygt

Tað sama kann ikki sigast um Christiano Ronaldo. Eftir fantastiska kappingarárið í fjør, har hann gjørdi 31 mál í Premier League, varð hann skurðviðgjørdur, og enn hevur hann ikki nátt somu hæddum sum í fjør. Kviki portugisin legði tó upp til seinna málið á Ewood Park, har Manchester United vann 0-2 á Blackburn. Málini gjørdu Wes Brown og Wayne Rooney.

Eisini Chelsea vann 2-0, tá teir á heimavølli tóku ímóti Aston Villa. Joe Cole og Nikolas Anelka gjørdu málini. Harvið eru teir fremstir í Premier Leauge við 17 stigum. Tað sama hevur Liverpool, sum tó ikki hevur gjørt heilt so nógv mál sum Chelsea.

Og tað man neyvan koma heilt óvart á tey flestu, at tað Chelsea er fremst. Hinvegin er tað púra óvæntað, at Hull, sum ongantíð áður hevur spælt í bestu ensku deildini, liggur á triðja plássi.

Gamla felagið hjá Juliani Johnson basti um vikuskiftið Tottenham, sum í mun til Hull City hevur fingið eina vanlukkuliga byrjan upp á kappingárið. Einans tvey stig hevur stóra felagið úr London fingið útav 21 møguligum, og tískil liggur Tottenham aftast í Premier League.

**Støðan í Premier League**

| | |
|---|---|
| Chelsea | 17 |
| Liverpool | 17 |
| Hull | 14 |
| Arsenal | 13 |
| Aston Villa | 13 |
| West Ham | 12 |
| Portsmouth | 12 |
| Manchester United | 11 |
| West Bromwich | 10 |
| Blackburn | 10 |
| Manchester City | 9 |
| Middlesbrough | 9 |
| Wigan | 8 |
| Sunderland | 8 |
| Everton | 8 |
| Bolton | 7 |
| Fulham | 6 |
| Newcastle | 5 |
| Stoke | 4 |
| Tottenham | 2 |

**Úrslitini í Premier League hetta vikuskiftið**

| | |
|---|---|
| Everton - Newcastle | 2-2 |
| Tottenham - Hull | 0-1 |
| Manchester City - Liverpool | 2-3 |
| Portsmouth - Stoke | 2-1 |
| Chelsea - Aston Villa | 2-0 |
| West Ham - Bolton | 1-3 |
| Blackburn - Manchester United | 0-2 |
| Sunderland - Arsenal | 1-1 |
| West Bromwich - Fulham | 1-0 |
| Wigan - Middlesbrough | 0-1 |

# Møguleiki fyri tí ómøguliga

**HB lúrir, og hugsanin um, at tað skal bera til hjá EB/Streymi at missa FM heitið, er væl meiri møgulig nú, enn hon hevur verið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Spádómurin hjá okkum um, at EB/Streymur fór at verða meistari á mikkjalsmessu, er gjørdur til skammar. Spenningurin er varðveittur, og nú verður tað ikki fyrrenn um tvær vikur og eftir at Eysturríki hevur vitjað, at svar fæst uppá, um tað fer at bera til at annað felag enn EB/Streymur verður meistari.

Í 2006 framdi HB bragdið at gera tað ómøguliga møguligt. Tá misti EB/Streymur FM heitið á stokkinum. Eftir at B36 við tíggju monnum í gjár vann málríku uppgerðina í Streymnesi, er møguleiki fyri, at annað av havnarfeløgunum fer at vinna FM heitið, sum tað síðani eina ferð tíðliga í summar hevur verið upplagt, at EB/Streymur fór at vinna.

Avgerðin er framvegis í hondunum á oddaliðnum. Um EB/Streymur annan sunnudag á útivølli megnar í minsta lagið javnleik ímóti nú niðurflutta Skála, so er FM heitið tryggjað. Um tað ikki eydnast á Skála, so verður nýggjur FM møguleiki um tríggjar vikur, tá ið HB fer at vitja við Margáir.

Tað kann væl vera, at havnarfeløgini annan sunnudag fara at spæla FM heitið upp í hendurnar á EB/Streymi. Tað gera tey, um lokaluppgerðin í Gundadali í 26. umfari endar við javnleiki.

Um HB fær fult ímóti B36, og um EB/Streymur einki fer at fáa burtur úr á Skála, so verður FM finala millum EB/Streym og HB í 27. umfari, og tá fer tað at bera illa til annað enn at rokna HB at verða FM favoritt.

Treytin fyri FM møguleikanum hjá B36 er, at B36 vinnur á HB og B68, at EB/Streymur einki fær burtur úr Skála vitjanini, og at HB í síðsta umfari fer at vinna í Streymnesi.

Einki er líðugt fyrrenn alt er líðugt, men tað skal valdast gummibein og sálarlig rangstøða, um tað ikki eydnast EB/Streymi at vinna eitt stig á Skála.

Eftir 25. umfar bendir alt á, at Víkingur er fokin í heiðursmerkjastríðnum. NSÍ er eisini við at detta niður ímillum, og Skála er flutt niður. Hvussu tað verður við seinna niðurflytingar plássinum er framvegis óvíst, men B71 er favorittur at missa plássið í Formuladeildini.